Góðk. el-innleggjaravirki · Klingrugarður 8 · FO-700 Klaksvík · Tlf 474 500 · Fax 474 501

# CHAMPIO LEAGUE TILBOÐ

**Verið fyrireikað at fylgja við endaspurtinum í Champions-league.**



**37” SAMSUNG FLATSKÝGGI**
LE37R89BD
LCD-skýggi við kontrasti á 8000:1,
3 HDMI-inngangum, Movie-Plus og
1366 x 768 upploysn. Er fyrireikað til
HD-tøknina og verður latið við fóti.

Fyrr: ~~14.499,-~~
**Nú bert 8.999,-**

**SPAR 5.500,-**



**STÓRT ÚRVAL**
Vit hava altíð eitt stórt úrval av flatskýggjum og tilhoyri til Playstation.

**PLAYSTATION 3**
Við 40 GB harðdiski
og 2 joystikkum

**Bert 4.499,-**





**el-in**

**WWW.EL-IN.FO**

## Umhvørvisstovan søkir eftir fólki til deildina Vernd.

*Eitt starv sum umhvørvisviðgeri er leyst at søkja á deildini Vernd.*

### Arbeiðsøkið
Starvið umfatar yvirhøvur mál innan karmarnar av umhvørvisverndarlóggávuni, serliga innan viðgerð av umhvørvisgóðkenningum.

Hetta merkir, at tú í tí dagliga kemur at arbeiða við at:

- gera uppskot til umhvørvisgóðkenningar
- røkja umhvørviseftirlit
- gera fakligar metingar av umhvørvisfrágreiðingum frá feløgunum
- fylgja við í altjóða gongdini innan umhvørvisvernd.

Tú kemur at arbeiða á deildini Vernd, sum fyrisitur lóggávu á umhvørvisøkinum. Uppgerð av umhvørvishagtølum og luttøka í umhvørvissamstarvi í norðurlendskum og altjóða høpi eru eisini partur av arbeiðinum. Á deildini starvast í løtuni fýra fólk

### Førleikar
Starvið er sera fjølbroytt og er bæði fakliga og persónliga avbjóðandi. Skikkað til starvið eru tey, sum hava lokið prógv innan umhvørvistøkni, náttúruvísind, verkfrøði e.l.

Vit sóknast eftir einum fólki við áræði og framfýsni at náa settum málum, sum sær nýggjar arbeiðsuppgávur sum eina spennandi avbjóðing, kann arbeiða sjálvstøðugt, dugir væl at samstarva, hevur kunnleika til edv-skipanir og hevur góð evni til at samskifta við onnur, bæði í skrift og talu. Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur royndir innan fyrisiting. Koyrikort til bil er ein treyt.

### Starvsmøguleikar
Vit kunnu bjóða eitt spennandi starv í einum nýskipaðum stovni, nógv samstarv við starvsfelagar, góðar møguleikar fyri persónligari menning og sjálvstøðugum arbeiði.

### Setan
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Talan er um fast starv fulla tíð.

### Fyrispurningar
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jóhonnu Olsen, deildarleiðara á Vernd, ella Jákup Paula Joensen, stjóra.

Umsókn, saman við prógvum, CV o.l., skal verða Umhvørvisstovuni í hendi innan 27. mai 2008.

**Umhvørvisstovan**
Traðagøta 38
Postboks 2048
FO-165 Argir
Ella teldupost: post@matrikul.fo

**umhvørvisstovan**

*Umhvørvisstovan er ein nýskipaður stovnur, sum fyrisitur lendismál, tinglýsing, fólkaskráir, náttúru- og umhvørvisvernd, viðarvøkstur og frílendi.*

sansir.fo

## Almenn móttøka

Í samband við at Meginskrivstovan hjá Nærverkinum er flutt í nýggj hølir á Argjavegi 26, Argir, verður móttøka mikudagin 21. mai, frá kl. 15.00 – 17.00.

**Øll eru hjartaliga vælkomin.**

**NÆRVERKIÐ**

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo